TILTØK

Hebron, Argir
Sunnudagin kl. 10.30 Minnismáltíð Harrans – ímeðan er barnaansing, kl. 12 Sunnudagsskúli – samstundis er møti, har Súni S. Jacobsen talar.
Mánadagin kl. 19 Hugnaløta teirra ungu. Heimasíða www.hebron.fo

Katólska kirkjan
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Orðsinstænasta við kommunión í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Orðsinstænasta við Kommunión í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Orðsinstænasta við kommunión í Mariukirkjuni, kl. 14 Sunnudagsskúli.

Meinigheitin í Hoyvík
uppi á Brekku 3
Sunnudagin kl. 11 Gudstænasta við Jóhan P. Johannesen, kl. 14 Sunnudagsssskúli.
Mánakvøldið kl. 20.30 Bønarmøti.

Meinigheitshúsið
Leygarkvøldið kl. 19.30-22 Juniorhugni fyri 6. flokk og eldri.
Dagarnar sunnud. 26. jan-2. feb. er Missiónsvika.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagssskúli – dósirnar til innsavnan til gøtubørn í Kiev verða innsamlaðar.
Sunnukvøldið kl. 18 Møti við Leo Hans Mikkelsen, ungdómskórið Effata av Strondum syngur.
Mánakvøldið kl. 20 Møti við Regin Høgnesen, sangbólkurin Sendiboð úr Rituvík syngur.

Frelsunarherurin, Tórshavn
Sunnudag kl. 11 Møti Mona Enstad og kap. Anne-Grethe Amland tala. Eingin sunnudagsskúli, men kl. 17 eru øll vælkomin til familjutíma, drekkamunnur aftaná.
Mánadag skótafundur kl. 17 og 19.
Týsdag hornvenjing kl. 17 og 20.

Tórshavnar Hvítusunnusamkoma
Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti, kl. 18.00 Evangel. møti. Øll eru vælkomin.

Filadelfia, Landavegur 22
Í dag kl. 17 Tímabøn.
Í morgin kl. 11 Bøn, kl. 17 Landsbøn, kl. 20 Bøn.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Tummas Jacobsen, kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 18 Felagsmøti v/ Evangeliihúsið.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

Ebenezer
Sunnudag kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti har Svenning av Lofti talar og Anja Hansen syngur, seinni partur av møtinum verður eitt vitnisburðarmøti.
Mikukvøldið kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

Samkoman Lívdin
Sunnumorgunin í Hoyvíkar skúla, familjumøti kl. 10.30 Evni: Hvat segði Jesus um familjuna? og tilbiðjanarmøti kl. 12, á báðum møtunum talar Símun Pætur á Torkilsheyggi. Barnaansing er undir báðum møtunum sunnudagsskúli er kl. 12. Millum møtini er drekkamunnur.
Týskvøldið Húsbólkar.
Heimasíða www.lívdin.fo

Samkoman Immanuel
Í kvøld kl. 20 Kongsins Herlið, 8 ár og eldri eru vælkomin.

Rhema á Hálsi
Mikukvøldið kl. 20 Húsmøti hjá Stellu og Petur Zachariassen, Reynsgøta 57, Argir.
Fríggjakvøldið kl. 18-19.30 ATAP (Barnaklubbur)
Leygarkvøldið kl. 20 verður eitt hugnaligt »Bill Gaither video kvøld« á stórskiggja. Eisini verður kaffi.
Sunnudagin kl. 17 Møti og sunnudagsskúli (Bønarmøti hálvan tíma áðrenn møti). Øll eru vælkomin. www.rhema.fo

Adventkirkjan
Leygardaign kl. 10 Barnabíbliutími og bíbliugransking. Evni: Tann ævigt galdandi sáttmálin, kl. 11 Gudstænasta, J. V. Danielsen.
Mikukvøldið Møti við J. V. Danielsen. Evni: Kristus og Antikristus.

Saron, Vestmanna
Hósdagin kl. 19 frítíðararbeiði.
Leygardagin kl. 15 og 17 Bíbilseminar, evni: Trúgv v/ Jón Miðberg.
Sunnudagin kl. 18 Evang. møti við Jóhan Hendrik Hansen.
Mánadagin kl. 20 Húsmøti hjá Binu og Jón.
Telefonandaktin 424741

Hvalvíkar missiónshús
Fríggjadag kl. 20 Møti við luttøku úr Tjørnuvík og Vík.
Leygardag kl. 20 Møti við Her aTróndheim og fleiri, røddir úr Hvalvík og Streymnesi syngja. Innsavnan til húsið.
Sunnudag kl. 15 Familjumøti við Jann Thomsen, kl. 18 Møti við Niels Jacob Nielsen og Mara Fuglø. Ung úr Hvalvík/Streymnesi syngja. Innsavnan til HM. Drekka aftaná møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Keldan, Skálafirði
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús við Paula Høj.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Símuni Absalonsen.
Barnamøti kl. 17.
Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum
Sunnudagsskúli verður 26. jan. kl. 14, Fríðhild Hansen greiðir frá arbeiðinum í Kiev og verða bússurnar samlaðar inn. Barnakórið luttekur við sangi.

Lívsins Orð
Tim 5 verður í dag kl. 17.30.
Barnamøti verður fríggjadagin kl. 17.15.
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti, kl. 17 Evangel. møti við ungdómsbólkinum í Hoyvík.
Mánadagin kl. 20 Ungdómsmøti.

Thabor, Fuglafjørður
Einki ungdómsmøti leygarkvøldið. Farið verður ístaðin á missiónsviku í Leirvík. Koyrt verður kl. 19.40 frá Thabor.
Sunudagin verður sunnudagsskúli kl. 14.30. Einki møti verður í Thabor, men farið verður á missiónsviku í Leirvík. Bilar koyra frá Thabor kl. 18.40.

Blákrossfelagið Lamba
Søldarfjørður, Skipanes bjóða til blákrossveitslu í missiónshúsinum í Søldarfirði sunnudagin kl. 18 Sverri Steinhólm talar, Martin Kúrberg greiðir frá lívi sínum og ungdómsbólkur luttekur við sangi. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Elim, Søldarfjørður
Sunnudagin kl. 12 Breyðbróting og sunnudagsskúli, kl. 18 evangel. møti. Levi Joensen og aðrir tala.
Mikukvøldið kl. 20 Bønarmøti.

Mansstevna, Sørvágur
Mansstevna verður í Sørvági í døgunum 14.-16. feb. Møti og seminar verða í missiónshúsinum meðan stevnuluttakararnir gisa og eta á Hotel Vágum. Nærri fæst at vita við at ringja til Harald Haraldsen, tlf. 217506 ella 314027.

Soli Deo Gloria
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Friðtór Debes.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti. Øll eru vælkomin.

Getsemane, Klaksvík
Mikukvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Fríggjakvøldið kl. 20 Ungdómsmøti, ung úr Filadelfia luttaka.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli og kl. 18 er møti við Sannu Hammer. Tú ert hjartaliga vælkomin.

Aglow, Klaksvík
Møti verður á Soli Deo Gloria leygarkvøldið kl. 20. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

Saron, Viðareiði
Osvald Kjærbo talar á evangel. møtinum sunnudagin kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Missiónshúsið í Skopun
Í kvøld kl. 20 verður Lovsongslota hjá Elisabeth og Hans Kristian.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, bússurnar til gøtubørnini í Kiev verða innsavnaðar.

Aglow, Sandoy
Aglow møti verður leygardagin kl. 20 í Samljóð, allar kvinnur eru vælkomnar.

Missiónshúsið á Tvøroyri
Ungdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 20
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Jacob Poulsen. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Frelsunarherurin í Vági
Leygarkvøldið kl. 20
Felagsmøti saman við Sion í bygdarhúsinum í Lopra.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 evangel. møti.
Mánakvøldið kl. 20 Heimafordunið.

Betel, Vágur
Friggjadagin kl. 20 Fundur v/ Janus Gunnarson, Høgni Johansen o.fl.
Leygardaign kl. 20 Fundur v/ Janus Gunnarson, Høgni Johansen o.fl.
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. fundur v/ Janus Gunnarson, Høgni Johansen o.fl.
Mánadagin kl. 20 Bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20 Uppbyggingarfundur.

Zions kirkens Sognehus, Esbjerg
Møti verður leygardagin 25. jan. kl. 19.30 í »Zions kirkens Sognehus«, sum liggur á Nygårdsvej 103 í Esbjerg, Símun Jacobsen talar.
Bønarmøti byrjar kl. 19.

Føroyahúsið
Sunnudagin 26. jan. kl. 17 verður Evangel. møti í Føroyahúsinum, Vesterbrogade 17A, Keypmannahavn, Øssur Berghamar talar. Á skránni verður eisini felagssangur, sangframførsla og annað. Aftaná verður økeypis drekkamuður. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Sønderborg
Føroyskt møti verður í Sønderborg missiónshúsi (Møllegade 9) sunnukvøldið kl. 19 v/ Kjartan Hansen pens. trúboðara. Allir føroyingar vælkomin til møti og at bera boðini viðari.

Heri Elttør í Danmark
Møtiskrá hjá føroyska trúboðaranum Hera Elttør í Danmark:
23.-25. jan. missiónsvika í Bethania í Herning, hvørt kvøld kl. 19.30.
27. jan. kl. 19.30 í Sønder Virum missiónshúsi.
28. jan. í Nr. Felding missiónshúsi.
30. jan. kl. 19.30 í missiónshúsinum Elim í Holstebro.
31. jan. kl. 19.30 í Ásted.
2. feb. kl. 19.30 í Harboøre missiónshúsi. Allir føroyingar eru vælkomnir til møtini.
Eisini vælkomin at kontakta trúboðaran Hera Elttør, Sønderagervej 60,
7490 Aulum, tlf. 97473786 – herielttor@mail.dk

Dagtilhaldið í Vági
er opið hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15.00-18.00. Øll kunnu vera við.

Dagtilhaldið Fløvin
kemur saman mánadagfriggjadag kl. 15.00-18.00 í húsunum hjá Kongshavnar Kvinnufelag.

BRÚKARASAMTAKIÐ
Brúkarasamtakið er felag fyri brúkarar í Føroyum. Limagjaldið er 100 kr. árliga. Øll, einstaklingar frá 16 ár og feløg, kunnu gerast limir við at skriva til postadressuna niðanfyri, ella venda sær til ein í nevndini: Ingun Simonsen, forkvinna, 317782/ 211696, ingun@post.olivant.fo
Hans Pauli Strøm, skrivari, 424044/221919, hps@kallnet.fo
Gunnleivur Dalsgarð, kassam., 314868/311210, gunnleiv@starvsmf.fo
Høgni Debes Joensen, 311832, trongrim@post.olivant.fo
Kristina Samuelsen, 311883/211883, kris@logting.fo
Brúkarasamtakið, Postboks 165, 110 Tórshavn

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og friggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10,
100 Tórshavn
tlf. 319130/61 655400.

Tilhaldið
í Tórsgøtu 21, tlf. 316491
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
Mánadagin 20. januar
kl. 9.45-10.15 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.15-12 Ítriv
kl. 14-18 Kortspæl, telving og onnur spøl. Tilmelding til døgurðan mikud. og friggjadag tlf. 316491
Týsdagin 21. januar
kl. 10-12 Vit baka
kl. 10-11.30 Sangur, B. og F. Samuelsen. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 15 **Misskiltar føroyskar/danskar skemtisøgur**. Marianna D. Dahl
Mikudagin 22. januar
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou. Høvi er at koma sum gestur
kl. 15 Túrur. Sjá skránna í bløðunum
Hósdagin 23. januar
kl. 10-10.30 Fimleikur Sonja Danielsen
kl. 14-17 Teluprát, Brandur Petersen
Fríggjadagin 24. januar
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði – høvi er at koma sum gestur
kl. 13-17 Opið hús

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Losjan í Havn Tinghúsvegur 18
Tiltakið fríggjadagin kl. 15 fyri tilkomin og eldri **er avlýst.**

Spælistovan í Meinigheitshúsinum
er opin frá kl. 9.00-12.00 mánadag, mikudag og hósdag fyri foreldrum við børnum uttan ansing.

Frá felagnum Pinkubarnadeyði
Vit hittast 2. leygardag í hvørjum mánaði í Jákupsstovu í J. Patursonargotu 24 í Havn. Nærri fæst at vita frá Annvor Nielsen tlf. 317261 ella Sólgerð Foldbo, tlf. 422184

Heilaskaðaráðgeving
Spyr um alt innan heilaskaða. Fyri bæði heilaskadd, avvarðandi og tey, ið arbeiða við afturvenjing.
Sendið okkum eitt meyl til neozone@neozone.dk
NeuroPlan, BellaVista, Bellevuevej 7, 2. tv., 2930 Klampenborg, Danmark.
Tú kanst eisini ringja til: tlf. +45 39902665 (Jón) mobil: +45 24430903 (Jón)
www.neozone.dk

AA-fundir í Havn
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundur verður í kvøld kl. 20-21 og 22.30-23.30.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

AA-fundur í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

AA-fundir í Vágum
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

Al-Anon í Vágum
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

AA í Vági
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

AA-Suðuroy
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

Blái Krossur – Glyvrar
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

Blái Krossur – Eiði
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

Náttarravnarnir í Tórshavn
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr.
Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552

ACA
(Adult children anonymous).
Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 í Reinsaríinum, Tórsgøta 5, Tórshavn.
www.aca-danmark.dk.
E-mail:
acafaroeislands@hotmail.com
Opin roykfríur fundur fyri øll áhugaði er hvønn sunnudag kl. 16.00-17.00, í Mariukirkjuni, Varðagøta 16.

Kvinnuhúsið
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

FILMSTEIGURIN

Die Another Day

Við James Bond úr Korea til Íslands…

Missiónin hjá James Bond byrjar sum ikki einaferð við eini ógvusligari jagstran – hesaferð er tað ein hovercraft-jagstran gjøgnum eitt minufelt í demilitariseraðu sonuni, ið skilir Suður- og Norðurkorea – og henda jagstranin heldur á líka til byrjunarteksturin kemur.

Úr Hong Kong til Kuba til London fer James Bond kring allan knøttin í royndum sínum upp á at avdúka ein svikjara og fyri at forða fyri einum kríggi við katastrofalum avleiðingum. Á ferð síni hittir hann Jinx (Oscar-vinnarin Halle Berry) og Mirandu Frons (Rosamund Pike), sum fáa ein avgerandi leiklut í seinasta ævintýri hansara.

Tætt í hølunum á deyðansvandamikla psykopatinum, Gustav Graves (Toby Stephens) og hinum ikki minni øra hjálparmanni hansara, Zao (Rick Yune) fer Bond til Íslands og beint inn í holu brotsmansins: Eitt slott, sum bara er bygt av ísi.

Har upplivir hann við egnum eygum eitt nýtt hitech vápn við valdsmiklum eginleikum. Alt hetta kulminerar í einum eksplosivum samanstoyti – og einum ógloymandi enda – aftur í Korea, har alt byrjaði…



Frumsýning
Fríggjadagin 24.01. kl. 20[15] Fríggjadagin 24.01. kl. 23[00]
Leygardagin 25.01. kl. 20[15] Leygardagin 25.01. kl. 23[00]
Sunnudagin 26.01. kl. 19[45] Sunnudagin 26.01. kl. 22[30]

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu

HAVNAR BIO
P Tlf. 31 19 56 P
www.bio.fo



Fríggjadagin 24.01. kl. 21[00] Fríggjadagin 24.01. kl. 23[30]
Leygardagin 25.01. kl. 21[00] Leygardagin 25.01. kl. 23[30]
Sunnudagin 26.01. kl. 22[00]

Fríggjadagin 24.01. kl. 17[30] Leygardagin 25.01. kl. 17[30]
Sunnudagin 26.01. kl. 18[30]

Fríggjadagin 24.01. kl. 18[15] Leygardagin 25.01. kl. 18[15]
Sunnudagin 26.01. kl. 17[45]

KOMANDI FILMUR

Frumsýning Fríggjadagin 31.01.